## Valfundur á Eiði

Fríggjakvøldið var valfundur á Eiði. 20 av teimum 21 valevnunum vóru møtt. So tað vóru 9 fyri annan listan og 11 fyri hin. Tað kom millum annað fram, at øll tey uppstillaðu eru fyri at gera okkurt við Hólman á Eiði. Eisini var meiriluti fyri at gera fótbóltsvøll, men summi vóru heitari fyri honum enn onnur. Valevnini vóru tó samd um at fara fram við skynsemi kring Hólman. Eisini var nógv kjak um fíggjarstøðuna hjá Eiðis kommunu, og nógvir spurningar vóru settir viðvíkjandi skattaprosenti og fíggjarlóg. Fíggjarlógin fyri 2009 er ikki samtykt enn, men freistin er 1. desembur. Fleiri eru, ið heldur høvdu vilja havt eina fíggjarlóg fyri valið.



# Kvinnurnar í Suðuroy vilja leggja kommunurnar saman

**Verða nóg nógvar kvinnur valdar í bý- bygdaráðini í Suðuroy í morgin, er góður gróðrarbotnur fyri kommunusamanlegging, og tað skal vera sum skjótast. Hetta var boðskapurin á almennari valcafé, har kvinnulig valevni frá allari oynni søgdu sína hugsan**

KOMMUNUSTÝRI
*Anna Mortensen*
*annapau@post.olivant.fo*
*Myndir: Talgilt*

Til stemningsfullu tónarnar frá Eyðun Nólsøe, sessaðust eini 60 fólk á Seglloftinum á Tvøroyri at hoyra kvinnuligu valevnini í oynni siga sína hugsan um kommunusamanlegging. Hetta var høvuðsevnið á hesi valcafé, sum kvinnufelagið Valkyrjurnar skipaðu fyri, og sum var ein liður í ætlanini hjá felagsskapinum at seta kikaran á kommunusamanlegging, sum tær fóru undir fyri einum mánað síðan.

Kvinnuligi valevnini vóru samdar um, at kommunusamanlegging er eitt av stóru og avgerandi uppgávunum hjá nýggju bý- og bygdaráðunum í Suðuroynni.

Flestu teirra vilja hava at farast skal undir eina tilgongd beinanvegin, at smíða sáttmála, sum allar kommunur kunnu taka undir við, men summar vilja fyrst síggja eitt veruligt samstarv ímillum kommunurnar. Tað kann gerast við at ein bólkur verður skipaður beint eftir valið við politikarum úr øllum kommunum, sum skal fara undir felags uppgávur, og at enda skulu borgararnir atkvøða fyri ella ímóti eini samanlegging.

Ein vansi við kommunusamanlegging er, at tað er ójavnt, hvussu kommunurnar eru fyri fíggjarliga og at tað eru tær smærru kommunurnar, sum eru frægari fyri enn tær størru og um, hvussu hesin munurin kundu javnast út.

Men kjakið flutti seg haðani frá til at snúgva seg um fyrimunir av alskyns slag við samanlegging, m. a. at ein felags kommuna er grundarlagið fyri øllum framburði, og kann bjóða øllum borgarum, úr Sumba til Sandvíkar, somu tænastur.

### Fíggjarstøðan

Hóast valevnini úr smærru bygdunum talaðu fyri samanlegging, stúrdu tær eisini fyri at verða tey, ið fyrst detta burtur ímillum í eini felags kommunu. Fer t.d. grótgarðurin í Hovi í einum óløgi, hvat so? Verður hann gjørdur aftur?

Kravið var, at allir borgarar í oynni skulu kunna merkja, at tey hava eina rødd í einum felags kommunustýri, tað verið seg gjøgnum staðbundnar nevndir ella líknandi.

Og tá kjakið snúði seg um fullar og skrelltómar kommunukassar, var ilt at fáa greiðu á, hvussu veruligu tølini síggja út.

Nevnt var, at t.d. Hvalbiar kommuna, sum ber orð fyri at eiga væl í kassanum, kanska ikki er so væl fyri hóast alt, men hevur eitt hall uppá 5,5 milliónir. - tað sigur ein faldari, sum er komin í hvørt hús í bygdini. Fyri at hjálpa uppá ójøvnu fíggjarstøðuna var skotið upp, at bygdin brúkar pengarnar uppá eitthvørt sum tørvur er á, barnagarð, umbygging av skúla ella annað, so hon kann koma at skylda eina álíkning, tá hon fer inn í felagskommununa.

At hetta var rætta loysnin, var fíggjarmálaráðharrin, Jóannes Eidesgaard - sum eisini hevði leitað sær á valcafé - ósamdur í. Heldur skulu kommunurnar fara inn í eina tilgongd við núverandi fíggjarstøðu, og so kundi loysnin møguliga blivið ein sanering av samlaðu skuldini niður á eina álíkning.



*Kvinnuligi valevnini til bý og bygdaráðsvalið í Suðuroy, taka undir við, at Øll Suðuroy verður savnað í eina kommunu og tann tilgongdin skal byrja beinanvegin*

### Sjónliggerð

Allar sum ein vildu kvinnuligu valevnini arbeiða fyri at opinleiki og sjónliggerð í framtíðini skal sermerkja kommunuarbeiði. Við teimum samskiftismøguleikum vit hava í dag, er tað bara ein sjálvfylgja, at alt alment tilfar verður lagt út á heimasíðu, og at borgarin hendavegin kann koma í dialog við fólkavaldu umboðini.



*Ein felags kommuna fyri alla Suðuroy, er grundarlagið undir øllum framburði og kann veta øllum borgarum í oynni, úr Sumba til Sandvíkar, somu tænastur*

### Branda Suðuroynna

Dapra støðan og útlitini hjá vinnuni varð sjálvandi eisini nortið við. Nýggir vinnuvegir – herundir ferðavinnan – eru lívsneyðugir. Kommunurnar í oynni hava sett ein ferðavinnusamskipara at skapa grundarlag fyri menning av hesi vinnu. Og hugskot vóru á lofti, um hvussu vit kunnu branda Suðuroynna. Víst var á, hvussu ferðavinnan í øðrum londum, við at seta søguna og upplivingina í hásæti, kann menna útjaðaran. Vit kunnu gera tað sama her, um vit vilja! Men meðan stóru tankarnar sluppu á flog, vóru tað nakrar, ið vístu á, at vit beinanvegin kundu byrja við vánaligu skeltingini av, og mongu holunum í busskipanini hjá bygdaleiðum. Fáa sett almen WC upp í oynni til ferðafólk, syrgja fyri, at man eisini "skeivar" tíðir av degnum kann fáa eitt máltíð á einum gistingarhúsi o.s.fr.

Eftir uml. trimum tímum við framløgum, kjaki, tónleiki og hugna á Seglloftinum, takkaðu valevnini áhoyrarunum, og vístu á Suðurrás – hetta stakgóða forum – har nærum allar hava prentað tankar og orð. Og Valkyrjurnar takkaðu fyri eina væleydnaða valcafé áðrenn kommunuvalið 2008.